

Ben Cohen og Jerry Greenfield




# Hippi ísurin komin til Føroya




ÍSARNIR **BEN&JERRY** HAVA NÚ EISINI FUNNIÐ VEGIN TIL FØROYA. ALT BYRJAÐI Á EINARI NIÐURLAGDARI BENSINSTØÐ Í USA



ÍSUR
Inna Tørnroos
inna@sosialurin.fo

Ímynda tykkum hetta: Tveir hippiarar + ein niðurløgd bensinstøð + eitt bævaskeið um hvussu ein ger ís = heimskendi ísurin Ben&Jerry.

Tað var soleiðis alt byrjaði í 1978. Barndómsvinirnir Ben Cohen og Jerry Greenfield avgjørdu, at teir skuldu lata kiosk við heimagjørdum ísi upp. Mjølkin og rómin til ísin kom frá kúnnum í lítla býnum Burlington, har teir báðir búðu.

Teir blandaðu alt møguligt í ísin - kakir, góðgæti, nøtir og annað. Einasta avmarking var, at teir skuldu dáma tað sjálvir, og at tað var stuttligt. Jerry er kendur fyri orðatakið: »If it's not fun, why do it?«

Ísurin bleiv skjótt kendur uttanfyri býin Burlington, og niðurlagda bensinstøðin gjørdist ov lítil. Ben og Jerry byrjaðu at pakka ísin og selja hann í handlum í USA. Líka til 1992 var tað bara gjørligt at keypa Ben&Jerry í USA og Kanada. 1992 kom ísurin til Russland og 1994 til Stóra Bretland.

## 15 ymisk sløg

Ben&Jerry ísarnir eru nú at fáa í 15 ymiskum sløgum. Tað, sum eyðkennir hesar ísarnar er, at tað ikki bara er sjokuláta ella vaniljusmakkur. Tað eru




stórir bitar av deiggi, køkum, nøtum og sjokulátu í ísinum. Nógv halda at hetta ljóðar eitt sindur vamlisligt, men tað er í flestu førðum, áðrenn tey hava roynt ísin.

Ben Cohen og Jerry Greenfield hava líka síðani teir byrjaðu fyritøkuna haft sum mál at virka fyri samfelagið. Teir nýta lokalar rávørur, geva stóran part av vinninginum til vælgerandi endamál. Pakka ísin í endurnýtslupapír og geva heimleysum arbeiði.

Ísarnir eru tíanverri ikki serliga bíligir - 59 krónur fyri ein hálvan litur í Miklagarði.

## INNIHALD

2 KLUMMA: **SPURDI JOHN WAYNE NAKRANTÍÐ UM VEG**
4 **EUROPA KRÍGGJAST UM KROSSARNAR**
7 90 SEKUND: **JÚSTINUS EIDEGAARD ANGRAR EINKI**
8 SAMRØÐA: **JÁKUP SVERRI KASS**
12 INTERVIEW: **CHRISTIAN HEDEGAARD - TRÆLIR AV FRÆLSI**
15 10 TING UM: **JÓLAMANNIN**
16 **KRIMIDROTNINGAR**
18 UMMÆLI AV INGÁLVI AV REYNI: **GARVILT!**
20 BARNALAGNUR: **SENDU FORELDRALEYS BØRN AV LANDINUM TIL TRÆLAHALD**
22 POLITIKKUR: **KYNSTRIÐ AT GJØGNUMSKOÐA BULLSHIT**
24 TIL ARBEIÐIS: **BJARKI POULSEN, KURÉR**
25 UMAFTURAFTURUMAFTUR: **HØGNI DJURHUUS**
27 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **GUMMUSA SJOKOMUFFINS**
31 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR osfr.**
32 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

# Spurdi John Wayne nakrantíð um veg?

KLUMMA
Eirikur í Jákupsstovu
eij@sosialurin.fo

So var tað her. Fyrsta kvøldið fyri mannfólk nakrantíð. Simpulten boys only.

Endiliga!

Men tað var eisini upp á tíðina. Kvinnurnar hava havt síni ljósareyðu ting við smoothies og neglaviðgerð í nógv ár.

Nú skuldu vit endiliga síggja, at javnstøða eisini er ein mannarættur. Men hvussu mansligt var hetta kvøldið Atlantis fyri viku síðan?

Menn koma inn og fáa fínan pinnamat við salati, so vit ikki dálka okkum fingrarnar.

Tíbetur er eisini akvavitt, so vit menn kunnu gloyma tað diddiliga við pinnamatinum við grøna salatinum.

So kemur upplýsingin og undirvísingin.

Menn skulu læra at vera rættir menn. Og har er valdmikli persónurin, sum skal læra menninar.

Har stendur hon!

Elin í Stórustovu. Ársins kvinna, vald av feministum og reyðsokkum í damublaðnum Kvinna.

Hon skal – saman við øðrum kvinnum – læra menn at finna vegin til Venus.

Og nú spyrji eg: Spurdi John Wayne nakrantíð um veg í Arizona oyðimørkini!?

Tað eru nevniliga bara tvey ting, sum eru meira irriterandi enn at spyrja um veg, og annað er at fáa at vita frá eini kvinnu, hvar vegurin er.

Og nú vit eru hjá kovboyunum. Hvat í verðini ger føroyska svarið uppá Hank Williams og John Wayne, Hallur Joensen, her í strammari grønari troyggju og hvítum joggingskóm?

Makeover? Skal kontrikongurin kanska eisini brúka sminku?

Tíbetur koma hesar kvinnurnar eisini við elektriskum amboðum. Nú byrjar at líkjast. Men hvat? Skulu lítlir ljósareyðir vibratorar nú bjarga parlagnum? Heilt erligt, hava vit ikki útgerð sjálvir?

Hví skulu kvinnur læra menn, hvussu teir skulu vera, tá tær sjálvar fáa hysteriskt anfall, tá vit freistast at rætta uppá tær?

Sig mær, hvat hendi við javnstøðuni?

Gott nokk fingu vit akvavitt, men pinnamat?

Hitt, sum er verri, er forrestin, tá frúan partú skal broyta mannin ...



»Hvønn veg góða?«

VIKUSKIFTI
**Redaktørar:** Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Jensen
**Forsíðumynd:** Christian Hedegaard / Jens Kristian Vang